## UTTAN ÚR HEIMI

## Ólóglig bílig arbeiðsmegi

Í Danmark, Noregi og aðrastaðni er tað vorðið vanligt, at myndugleikarnir avdúka fólk, sum eru komin úr Eysturevropa at arbeiða, uttan at tey hava tey neyðugu loyvini.

Týsdagin gjørdi løgreglan í norska býnum Drammen eitt átak ímóti ólógligari arbeiðsmegi. Tá átakið var liðugt, hevði løgreglan tikið 23 fólk úr Russlandi, Ukraina og Hvítarusslandi. Tað vísti seg, at eitt felag hevði fingið tey 23 til Noregs at arbeiða, og at eingin teirra hevði uppihalds- ella arbeiðsloyvi. Í summar tók løgreglan í Drammen 19 eysturevropearar, sum arbeiddu har ólógliga. Tað var sama felag, sum hevði fingið tey at koma til Noregs.

Løgreglan hevur ikki gjørt av, um hon fer at leggja sak ímóti felagnum, sum hevði fingið fólkini til Noregs og síðani leigað tey út sum bíliga arbeiðsmegi. Løgreglan vil ikki siga, hvat felag talan er um, men sambært blaðnum Aftenposten var tað eitt felag í Danmark, sum hevði fingið eysturevropeararnar til Noregs at arbeiða.

## Stórir svenskir nýføðingar

Svenskir nýføðingar gerast altsamt størri og størri, men tað er ikki bara gott, siga serfrøðingarnir, sum halda, at okkurt skal gerast við málið.

Fyri 30 árum síðani vigaðu 2,8 prosent av teimum nýføddu í Svøríki meiri enn níggju pund, men nú vísir ein nýggj kanning, at í dag viga 4,4 prosent av nýføðingunum meiri enn níggju pund. Harafturat vísir kanningin, at svensku kvinnurnar eru eisini tyngnaðar. Fyri tíggju árum síðani vigaðu kvinnurnar í meðal 64 kilo, tá tær gjørdust við barn, men í dag er meðalvektin 67 kilo. Sambært Anders Åberg, yvirlækna á lærda háskúlanum í Lund, er hetta ein sera stórur vøkstur eftir bara tíggju árum.

Læknin Kalle Kallén sigur við blaðið Dagens Nyheter, at vandin fyri, at kvinnurnar fáa skaða undir føðingini, veksur, tá børnini gerast so stór. Hon sigur seg kortini ikki duga at siga, um trupulleikin kann loysast við at lata kvinnurnar eiga við keisaraskurði.

## Madonna nógv verd

Nakrir íleggjarar við kanadiska vinnulívsmanninum Edgar Bronfman á odda hava keypt felagið Warner Music frá amerikonsku stórfyritøkuni Time Warner. Í keypinum er eisini útgávufelagið Warner/Chappell.

EMI lá framvið at keypa Warner Music. Felagið var til reiðar at leggja einar 11 milliardir krónur á borðið, men tað vísti seg ikki at vera nóg mikið. Hvussu nógv Edgard Bronfman og hinar íleggjararnir hava goldið fyri Warner Music, er ikki heilt greitt, men sambært Reuters liggur prísurin um einar 16 milliardir krónur.

Serkøn ivast ikki í, at Bronfman og hansara felagar fara at vinna íløguna innaftur. Millum viðskiftafólkini hjá Warner Music eru kend nøvn sum Madonna, R.E.M. og Metallica, og tað man borga fyri, at íløgan er pengarnar verd.

## Billy the Kid kannast

Tann tiltikni Billy the Kid er aftur vorðin umrøðuevni í USA, eftir at guvernørurin í New Mexico hevur gjørt av at kanna, hvør maðurin veruliga var, og hvussu hann doyði.

Billy the Kid skjeyt tveir løgreglumenn, tá hann flýddi úr fongslinum í Lincoln County í New Mexico tann 28. apríl í 1881. Nú vil Bill Richardson, guvernørur, hava at vita, hvaðani Billy the Kid fekk skammbyrsuna, sum hann skjeyt teir báðar løgreglumenninar við. Sambært søguni kom sheriffurin Pat Garret fram á Billy the Kid tann 14. juli í 1881 og skjeyt hann. Bill Richardson, guvernørur, vil nú hava staðfest, um hetta veruliga var so.

Tað eru minni enn so øll, sum trúgva, at Pat Garret veruliga drap Billy the Kid. Summi halda, at tað var øvugt, og at tað eydnaðist Billy the Kid at sleppa til Onglands, og at hann doyði har sum gamal maður.

# Hann hevur ikki uppiborið at liva

*John Allen Muhammad er dømdur til deyða fyri at hava myrt tíggju fólk í Washington í fjør. Eingin veit, hví hann gjørdi tað*



**Nevningarnir hava gjørt av, at John Allen Muhammad skal takast av døgum, tí hann myrdi tíggju fólk á Washington-leiðini í fjør.**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 42 ára gamli fyrrverandi hermaðurin hevur bert ein møguleika, skal hann sleppa undan, at deyðadómurin verður fullførdur. Nevningarnir hava dømt hann til deyða, og í februar skal tann løgfrøðiligi dómarin taka støðu. Hann kann broyta dómin til lívlangt fongsul, men tað er ógvuliga sjáldsamt í statinum Virginia, har rættarmálið hevur verið.

Tað var heldur ikki av tilvild, at rættarmálið ímóti John Allen Muhammad varð hildið í Virginia. Upprunaliga skuldi tað vera í einum øðrum stati, men løgmálaráðharrin, John Aschroft, kravdi, at tað skuldi haldast í Virginia, tí har var størri møguleiki fyri, at maðurin bleiv dømdur til deyða.

Hann og ákæruvaldið fingu sín vilja, men enn veit eingin, hví tann 42 ára gamli fyrrverandi hermaðurin myrdi tey tíggju fólkini, og tað kemur kanska ongantíð fram.

– Eg haldi bert, at hann hevði fragd í at myrða fólk. Hann hevur ikki uppiborið at liva, segði ákærin, Paul Elbert.

# Tjóðskaparkreftirnar vinna fram á Balkan

**Í Kroatia hava teir tjóðskaparsinnaðu vunnið valdið, og eygleiðarar vænta, at tað sama kann henda í Serbia og Montenegro, tá val verður har tann 28. desember.**

BALKAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sosialdemokratarnir, sum hava havt valdið í Kroatia, vóru fyri einum lemjandi ósigri á tjóðartingsvalinum sunnudagin. Tann stóri vinnarin var tann tjóðskaparsinnaði flokkurin HDZ, sum saman við trimum smáum konservativum flokkum hevur fingið meiriluta í tjóðartinginum.

Nógvir eygleiðarar á Balkan siga, at valúrslitið í Kroatia er hugvekjandi, tí tað vísir, at tær víðgongdu tjóðskaparsinnaðu kreftirnar har aftur standa í fullum blóma, og at úrslitið helst verður tað sama í Serbia og Montenegro, tá tjóðartingsval verður har tann 28. desember.

HDZ er sami flokkur, sum fyrrverandi kroatiski leiðarin, Franjo Tudjman, stóð á odda fyri, til hann doyði í november í 1998. Stjórnin hjá Tudjman var fyri hvøssum atfinningum, tí hon legði lítið í mannarættindi, og tí hon sýtti fyri at samstarva við krígsbrotsmannadómstólin í Haag.

Nú bera nógvir kroatar ótta fyri, at tann komandi stjórnin hjá HDZ fer at venda aftur til ta gomlu kósina, skrivar norski tíðindamaðurin Jan Gunnar Furuky úr Zagreb.

Tann fráfarandi sosialdemokratiska stjórnin hevur arbeitt fyri at fáa Kroatia upp í ES, men eygleiðarar halda, at valúrslitið sunnudagin fer at gera tað truplari hjá landinum at fáa limaskap í Evropasamveldinum.




**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

## Samskipari

Innan Heimarøktina og Serforsorgina er starv sum samskipari fyri Heimarøktina leyst at søkja til setan skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu. Starvið er fyribils tíðaravmarkað til 2 ár.

Almannaráðið, sum stovnurin hoyrir undir, arbeiðir í løtuni við málinum um at leggja eldraøkið út til kommunurnar. Ein av uppgávunum hjá samskiparanum verður tí eisini at arbeiða við broytingunum á økinum hesum viðvíkjandi.

Heimarøktin veitir sjúkrarøkt og heimahjálp kring alt landið og er býtt upp í 6 øki. Skipanin umfatar 339 heilársstørv og verður tænasta veitt bæði heimabúgvandi brúkarum og sambýlisbúgvum.

Heimarøktin og Serforsorgin fyrisitur eisini Ellis- og røktarheimsøkið.

Samskiparin skal hava ábyrgd fyri dagligu samskipanini av virkseminum hjá Heimarøktini.

Samskiparin skal somuleiðis standa fyri eftirlits- og ráðgevingarskylduni mótvegis Ellis- og røktarheimsøkinum.

Talan er um eitt fjølbroytt starv við spennandi, avbjóðandi og til tíðir eisini krevjandi uppgávum í einum dynamiskum umhvørvi. Møguleiki er fyri áhaldandi menning av førleikanum fyri at røkja uppgávur stovnsins til lítar.

**Starvið inniber hesar høvuðsuppgávur:**
- skipa og leggja til rættis fíggjarstýringina á økinum og gera greiðar mannagongdir fyri fíggjarliga økið
- fremja støðugt játtanareftirlit
- tryggja skipaðan og miðvísan samanhang millum virksemið og fíggjarligan karm
- skipa og útvega einsháttað upplýsingar- og hagtalstilfar sum fremur eitt haldgott avgerðargrundarlag fyri stovnin og myndugleikan
- hava málsviðgerðina á økinum um hendi
- skipa samstarv innanhýsis og við aðrar stovnar
- skipa fyri og luttaka í verkætlanum

**Vit vænta at samskiparin:**
- hevur viðkomandi útbúgving helst frá hægri lærustovni
- hevur viðkomandi starvsroyndir
- evnar at yvirskoða fløktar samanhangir og at taka avgerðir
- evnar at seta í verk fyriskipanir og verkætlanir og fylgja hesum upp
- hevur góð samskiftisevni, herundir góðan málsligan førleika
- dugir væl við fólki
- er førur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum
- kann ferðast út í økini kring landið

**Løn- og setanartreytir:**
Løn sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarstaðurin er Heimarøktin og Serforsorgin. Tænastustaðurin fyribils er Heimarøktin, Meginskrivstovan.

Tann, ið settur verður má tola broytingar í starvinum og at starvið kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur innan H eimarøktina og Serforsorgina.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Att.: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarði 2
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** Mikudagin 17. desember 2003 kl. 12.00



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Stuðulsfólkaskipanin er partur av sosialu deild í kommununi. Hon hevur egnu umsiting og er skipað í tveimum deildum: *Serdeildin* tekur sær av børnum á dagstovni við varandi breki, menningartarni o.l., meðan *Familjudeildin* tekur sær av børnum 0-18 ár, sum hava aðrar trupulleikar.

Starvsfólk verða sett í starv í stuðulsliðnum og fáa eina ella fleiri uppgávur.

Arbeiðið gongur vanliga fyri seg á dagstovni ella frítíðarskúla og kann t.d. verða at stuðla einum ella fleiri børnum sum :
- hava talu- ella samskiftistrupulleikar
- eru rørslutarnaði
- ikki trívast ella mennast aldurssvarandi
- hava trupulleikar í sosiala samanspælinum
- hava DAMP ella SI-trupulleikar ella
- eru menningartarnaði, hava Down´s syndrom e.l.

www.torshavn.fo

## Stuðlar til Stuðulsfólkaskipanina

Søkt verður eftir fólki til Serdeildina at byrja 1. januar 2004 ella eftir nærri avtalu. Størvini eru millum 25 og 40 tímar um vikuna.

**Størvini:**
- Eitt starv 40 tímar um vikuna í serstovuni í Øksnagerði, sum er eitt serligt tiltak fyri børn við samskiftistrupulleikum. Tú verður partur av einum fakligum toymi, sum arbeiðir miðvíst við at menna samskiftið í einum struktureraðum og visuellum umhvørvi.
- Eitt starv 30 tímar um vikuna hjá barnagarðsbarni, har arbeitt verður við málsligu, rørsluligu og sosialu menningini
- Eitt starv 30 tímar um vikuna hjá barnagarðsbarni, sum hevur tørv á serligum eftirliti
- Eitt starv 25 tímar um vikuna hjá barni í frítíðarskúla, sum hevur serligan tørv á struktur og vegleiðing
- Søkt verður eisini eftir føstum avloysara

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi og mennandi starv, har tú arbeiðir sjálvstøðugt, men verður partur av einari skipan við basisbólkum og starvsfólkamenning, og tú hevur fast samband við ein pedagogiskan ráðgeva

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at umsøkjarar hava námsfrøðiliga ella aðra hóskandi útbúgving, men verður størsti denturin lagdur á :
- at umsøkjararnir hava royndir við børnum eins og royndir innan tað pedagogiska arbeiðsøkið
- at viðkomandi hevur hug og evni at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi
- at umsøkjarin er búgvin og kann arbeiða sjálvstøðugt og er opin fyri menning í arbeiðinum

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið kann vera full- ella parttíð og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag ella møguliga annað avvarðandi yrkisfelag, Fíggjarmálastýrið og Kommunala Arbeiðsgevarfelagið. Skipað verður fyri ráðgeving, kollegiala supervisión og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Trønd Ennistíg, pedagogiskan ráðgeva ella Birgit Debess, leiðara á Stuðulsfólkaskipanini tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10. desember 2003. Viðmerk á umsóknina "Stuðulsfólkaskipanin"



TÓRSHAVNAR HAVN



**Tórshavnar Havn** er 250.000 fermetrar, harav eru 50.000 fermetrar bingjupláss.

Árliga leggja 3.800 skip at bryggju í Tórshavnar havn

## Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki til Tórshavnar Havn. Starvið umfatar upprudding á økinum hjá Tórshavnar Havn og annað fyrifallandi arbeiði.

Tú hevur stóra koyrikortið, ert røkin og ert fittur í hondunum.

Starvið verður sett skjótast tilber sambært sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Meiri fæst at vit um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge tlf. 31 17 62.

**Umsókn**
skal vera Tórshavnar Havn, Eystara Bryggja P.O. Box 103 FO-110 Torshavn, í hendi í seinasta lagi 3. desember 2003. Viðmerk arbeiðsfólk á brævbjálvan.


Sosialurin -tað loysir seg